# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Nýggj súpan í bakarínum Hjá Jórun í Klaksvík

*Lagt til rættis: Manja Johansen og Anna Rødgaard.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*




Á tí nýggja og vælumtókta bakarínum Hjá Jórun í Klaksvík, hava tey fingið ein nýggjan rætt á matskránna, ið er ein fiskasúpan.

Vit vóru á gáttini týsdagin, tá súpanin fyri fyrstu ferð varð seld. Vit fingu eitt prát við ein, sum stóð í køkinum. Hon greiddi okkum frá, hvat var í súpanini, men vildi ikki úttala seg ov nógv.

Tey løgdu afturat, at hetta var meir ein reklama fyri fiskavirking í Klaksvík.

Vit fingu ein smakkiroynd, og halda avgjørt, at hon kann viðmælast øllum.

## Floytuskeið á Musikkskúlanum

Í dag og hósdagin verður floytuskeið hildið á Tórshavnar Musikkskúla. Tað er solofloytuleikarin í Malmø Symfoniorkestur Malin Nordløf, sum fer at undirvísa føroyskum floytunæmingum. Undirvísingin verður skipað sum samanspæl, har floytunæmingar úr øllum landinum fara at spæla saman, harafturat verður undirvísingin eisini skipað sum Master Class, har framkomnir næmingar fáa undirvísing, meðan ein hópur av øðrum næmingum lýða á.

Tað eru floytulærararnir, Bernharður Wilkinson, Katja Volovelskaja, Helga Hilmarsdóttir Gerðalíð, Súsanna Joensen, Otniel Nygaard og Andrea Heindriksdóttir, sum saman við Tórshavnar Musikkskúla skipa fyri skeiðnum.

Skeiðið endar við konsert hóskvøldið. Hendan verður í Skálanum í Tórshavnar Kommunuskúla kl. 20.00.



*Føroyskir floytunæmingar fáa køna undirvísing í dag og í morgin*




Nýtt pensjónsfelag

Skjótt verður betri...

Betri pensjón er nýggja pensjónsfelagið í Føroyum. Vit fara heilt einfalt at bjóða føroyingum betri pensjónir og lívstryggingar, og fara í næstum at venda okkum til fakfeløg, virki og einstaklingar runt landið.
Málið er at vera fremsta og besta pensjónsfelagið.

Tað er okkara mál, at viðskiftafólkini hava fult innlit í alt, sum fyriferst við teirra samansparing, trygging og íløgum. Tú skalt vita, hvat tú rindar fyri, hvat tú fært fyri pengarnar, og hvussu peningurin verður umsitin.

**Hygg inn á www.betri.fo og fá meira at vita.**

Betri pensjón, Postsmoga 329, Kongabrúgvin, FO-110 Tórshavn
www.betri.fo

Betri pensjón

sansir.fo